

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 10 - 2012

# Semja um at fyribyrgja oljudálking í Arktis

Tey átta londini í Arktiska Ráðnum avgjørdu á fundi í Reykjavík nú um dagarnar at undirskriva eina bindandi avtalu um oljudálking í Arktis. Tað vóru meira enn 70 umboðsfólk á fundinum, tá avgerð varð tikin um at skriva undir avtaluna, sum setir krøv til tey einstøku limalondini. Avtalan snýr seg m.a. um at felags kunning og venjingar. Londini hava longu hvør sær ymiska útgerð og vitan um økið, men ymiskt er, hvussu tey ymsu londini eru fyrireikað. Hetta er ein einastandandi avala, segði íslendski uttanríkisráðharrin, Øssur Skarphéðinsson við Fréttablaðið. Henda avtalan er søgulig og eitt týðandi stig fyri okkum, tí avtalan er ein av hornasteinunum í íslendska arktiska politikkinum seinastu árini, og eg eri serliga fegin um, at avtalan er undirskrivað í Reykjavík, segði hann. Mynd - Øssur Skarphéðinsson, uttanríkisráðharri fegnast um nýggju avtaluna móti oljudálking. Mynd Artic Portal.